# Prix Føroyar ávirkar Ísland

**Prix Føroyar kappingin hevur givið úrslit í Íslandi, har føroyskur tónleikur hevur verið í loftmiðlum alla vikuna og bløðini hava skrivað um føroyskan tónleik**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Síðstu mongu dagarnar hevur føroyskur tónleikur verið at hoyrt í íslendska ríkisútvarpinum og Rás 2. Dag eftir dag hevur verið soleiðis og somuleiðis hevur Morgunblaðið dagliga havt okkurt um føroyskan tónleik.

Alt er orsakað av Prix Føroyar tiltakinum.

Íslendingar vilja fegnir frætta um tær í Íslandi so væl kendu stjørnurnar, ikki minst Eivør, Týr , 200, Makrel, Høgna Lisberg og fleiri.

Í Íslandi fegnast tey um professionalismuna í tiltakinum AME, har tøknin riggaði til UG í Norðurlandahúsinum.

- Í Íslandi eru vit von við, at alt verður gjørt í síðstu løtu, eisini tøknin, og so riggar sjálvandi ikki altíð so væl, sigur Jens Guð, heimildarmaður okkara í Íslandi.

Fyri fáum árum síðani kendu íslendingar nærum onki til føroyskan tónleik og Prix, men í dag er øðrvísi og tey flestu kenna føroyskar tónleikarar, Prix og AME, ið eru tiltøk, ið fáa stóra rúmd í íslendskum miðlum.

Síðstu fimm vikurnar hevur Eivør Pálsdóttir havt báðar sínar síðstu fløgur á topp 30 listanum í Íslandi. Vanligt er ikki, at sami tónleikari hevur tvær fløgur á topp 30 samstundis. Og als ikki í heilar fimm vikur.

- Men hetta prógvar, hvussu stórt navn hon í veruleikanum er í Íslandi, metir Jens Guð.



*Eftir Prix Føroyar og AME hevur føroyskur tónleikur verið í fokus hjá grannum okkara í Íslandi*






## Yvir milliardina í yvirskoti

**Úrslitið hjá Kaupthing Bank hf. fyri 1. ársfjórðingi av 2005 var 1.050 milliónir DKK.**

ROKNSKAPUR

*tíðindaskriv*

Rentingin av eginpeningínum var 33,2% í mun til 29,3% fyri 1. ársfjórðingi av 2004.

Fíggjarinntøkurnar vóru 2.062 milliónir DKK - ein hækking á 126,5% í mun til somu tíð síðsta ár. 62% av hesum inntøkum stava nú frá rakstri uttanfyri Ísland. Rakstrarútreiðslurnar hækkaðu tó somuleiðis. Hesar vóru 625 milliónir DKK - ein hækking á 33%.

Fíggjarjavnin er nú 158 milliardir DKK, harav lán til kundar eru 112 milliardir DKK. Eginpeningurin er 16 milliardir DKK og solvensurin hjá bankanum er 14,4%.

## Nú verður aftur farið at tuska í Vági

Nú ferð Kunningarstovan í Vági attaka fasta táttin við gonguferðum einaferð um vikuna, uppaftur.

Hetta var ein táttur, sum Kunningarstovan fór undir í fjør og tað fekk so mikið stóra undirtøku, at tiltakið verður tikið upp aftur í summar

Gonguferðirnar verða hvørt mikukvøld og hvørja ferð skal gongufólkið hittast við Gamla Skúla kl. 19.

Fyrsti túrurin mikukvøldið og tá gekk leiðin vestur á Eiðið.

– So ert tú ein av teimum, sum hevur hug at njóta ein gongutúr saman við øðrum, er tað nú at "farið verður at tuska í Vági", sum Kunningarstovan í Vági kallar tiltakið.

### Kunningarstovan í Vági flytir

Annars er ætlanin at Kunningarstovan í Vági skal flyta í næstum.

Higartil hevur Kunningarstovan hildið til í Gamla Skúla, men gongur sum ætlað, flytir hon í næstu viku í somu høli, sum býráðsskrivstovan í Vági er í. Men telefonirnar eru tær somu.